# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Healy heldur lív í Norðurírlandi



*David Healy tryggjaði enn ein sigur til Norðurírland, tá hann skoraði tvær ferðir ímóti Liechtenstein. Hann hevur nú skotið heili 11 mál í sjey EM-undankappingardystum fyri Norðurírland.*

*Mynd: Polfoto*

**David Healy var aftur undangongumaðurin, tá Norðurírland í gjár vann heimadystin í EM-undanbólki B ímóti Liechtenstein. Sigurin ger, at Norðurírland aftur er á øðrum plássi**

FÓTBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein hópur av landsdystum vóru á skránni kring heimin í gjárkvøldið – bæði vinardystir og týðandi EM-undankappingardystir. EM-undankappingardystirnir vóru ikki so nógvir í tali, men tó vóru fleiri óvæntaði úrslit á skránni.

Í EM-undankappingarbólki A vóru tríggir dystir á skránni, og tí var at kalla fult umfar. Eitt av norðanlondunum vóru í dysti, tá Finnland tók ímóti Kasakstan, og her megnaðu finnar at vinna 2-1. Sigursmálið skoraði Tottenham-leikarin, Teemu Tainio, um miðjan seinna hálvleik.

Í næsta dystinum misti Portugal týðandi fet í royndunum at koma víðari til EM, tá ið teir bert fingu javnleik 1-1 úti ímóti Armenia. Men hóast Serbia nú hevði møguleika at fara fram við Portugal, so kiksaðu teir eisini, tá teir vitjaðu í Belgia. Belgia vann nevniliga dystin 3-2, og við hesum úrslitunum er EM-undanbólkur A víðopin.

## Tvey mál

Eitt av mest yvirraskandi liðunum í EM-undankappingini hevur verið Norðurírland. Í gjár spældu teir á heimavølli ímóti Liechtenstein, og Norðurírland vann 3-1. Sum ikki einaferð var tað Fulham-áleyparin, David Healy, sum legði grundina til sigurin, tá hann skoraði tvey mál undan steðginum.

Við sigrinum er Norðurírland á øðrum plássi tvey stig aftan fyri Svøríki, meðan teir eru eitt stig framman fyri Spania og seks stig framman fyri Danmark. Danmark hevur tó leikt ei dyst færri enn hini liðini.

Leggjast kann afturat, at Healy við sínum tveimum málum í gjár nú hevur fingið 11 mál í sjey dystum í hesum EM-undankappingini, og hann liggur einsamallur á odda á máltindinum.

# Kramer og Østergaard til Føroya

**Tann 13. September heldur Fremad Amager stórt tiltak á Hotel Føroyum. Fyrilestrarhaldarar verða fyrrverandi borgarstjórin í Keypmannahavn, Jens Kramer Mikklensen, og Flemming Østergaard**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sponsorrøkt er vorðið eitt alt meira vanligt hugtak innan ítróttarheimin, og tiltakið á Hotel Føroyum er ein partur av konseptinum, sum Fremad Amager hevur valt at røkja sínar sponsorar eftir. Talan er um tiltak, sum er ætlað bæði føroyskum og donskum sponsorum, har talan fyri donsku sponsorarnar er um eina heildarupplivíng í Føroyum.

Teir báðir fyrilestrarnir verða hildnir hóskvøldið tann 13. september, og eftir hetta verður talan um sonevnda networking millum ymsu sponsorarnar, ið sjálvandi eisini fáa ein betri bita á staðnum.

Enn er sjálvandi dekan ov tíðliga at siga, hvussu áhugin fyri tiltakinum er. Men tað er einki at ivast í, at gestalistin við Kramer og Østergaard telur tveir av dugnaligastu fyrilestrarhaldarunum í Danmark. Og ikki minst man Flemming Østergaard vera áhugaverdur fyri eitt og hvørt fótbóltsfelag, tí meira enn nakar annar hevur hann prógvað, hvussu eitt slíkt skal byggjast upp til ein veruligan kraftdepil.

# Føroyar skeivan veg á FIFA-listanum

**Føroyska fótbóltslandsliðið er farið enn longur niður á FIFA-styrkilistanum, so teir nú eru at finna á einum 190. plássi**

Tað hevur støðugt gingið niður á bakka hjá føroyska fótbóltslandsliðnum á FIFA-styrkilistanum síðstu árini, og nú er Føroyar aftur farið skeiva vegin. Á síðsta FIFA-listanum er Føroyar dottið tvey pláss niður eftir listanum, so okkara landslið nú er at finna á 190. plássinum.

Hetta er tað lægsta, sum Føroyar nakrantíð hava verið á listanum, og um vit skulu fylgja FIFA-listanum, so er Føroyar ímillum 20 tey veikastu landsliðini í FIFA-hópi.

Millum fremstu liðini er at kalla eingin broyting, tí Brasilia er enn á odda framman fyri Argentina og Italia.

Av norðanlondum liggur Svøríki fremst á einum 19 plássi. Danmark er farin fýra pláss niður og liggur nú nummar 30. Noreg stendur í stað á 35. plássi, meðan Finland er farið trý pláss upp til nummar 38. Ísland er næstaftast av norðanlondunum á listanum. Teir eru farnir heili átta pláss aftur og liggja í løtuni á einum 117. plássi.

# U-21 móti Italia

**Christian Mouritsen er aftur klárur til U-21-landsliðið, sum í komandi mánaði skal spæla á útivølli ímóti Italia**

U-21 landsliðið, sum skal spæla ímóti Italia og Grikkalandi í komandi mánaði, er í dag úttikið, og har er fleiri nøvn við, sum ikki vóru við seinast vegna skaða.

Hvørki Christian R. Mouritsen, Arnbjørn Hansen ella Páll Mohr Joensen vóru við í hópinum seinast vegna skaða, men hesir eru allir við í hópinum, sum nú skal spæla úti ímóti Italia og heima ímóti Grikkalandi.

Landsliðsvenjararnir Bill Jacobsen og Heðin Askham hava tikið hesar leikarar út til dystirnar:

Jónas Tór Næs og Pætur T. Jørgensen úr AB, Einar Hansen, Jóhan Davisen og Bogi Løkin úr NSÍ, Poul Thomas Dam, Emil N. Leifsson, Ólavur í Ólavsstovu og Páll M. Joensen úr HB, Levi Hanssen úr Skála, Jóhan V. Gunnarson úr B36, Arnbjørn T. Hansen úr EB/Streymi, Sam Jacobsen úr GÍ, Magnus Olsen og Símun Rógvi Hansen úr B71, Kristoffur Jakobsen úr KÍ, Gunnar Nielsen úr Blackburn og Christian R. Mouritsen úr Manchester City.



*Arnbjørn T. Hansen er ein av leikarunum, sum aftur er at finna á U-21-landsliðnum. Hann var ikki við seinast vegna skaða.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*